**Máltal: 12/00151**

# Rundskriv

## um sjálvlesandi í fólkaskúlanum

Við heimild í § 16, stk. 2 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verður ásett:

**§ 1.** Sjálvlesandi, sum ætla at fara til próvtøku í 9. ella 10. flokki, skulu skriva seg inn í talgilda innskrivingarskipan hjá Mentamálaráðnum.
*Stk. 2.* Seinasta freist at skriva seg inn til próvtøku í 9. og 10. flokki er 25. februar á hvørjum ári.
*Stk. 3.* Innskriving og próvtøka, sbrt. stk. 1, fer fram í hesum fólkaskúlum:

1) Eysturskúlanum, Tórshavn
2) Miðvágs/Sandavágs skúla, Miðvágur
3) Runavíkar kommunuskúla, Runavík
4) Skúlanum á Ziskatrøð, Klaksvík
5) Tvøroyrar skúla, Tvøroyri

*Stk. 4.* Sjálvlesandi skulu seta seg í samband við skúlan, har viðkomandi ynskir at fara til próvtøku, fyri at fáa fakliga vegleiðing um pensum, próvtøkuuppgevingar o.a.
*Stk. 5.* Sjálvlesandi, sum ikki hava avtalað pensum o.a. við skúlan í seinasta lagi 25. februar kunnu ikki fara til próvtøku.

**§ 2.** Innskriving til próvtøku í 9. og 10. flokki fer fram í hvørjari lærugrein sær.
*Stk. 2.* Í lærugreinum, sum hava ein skrivligan og ein munnligan tátt, fevnir innskriving og próvtøka um báðar tættir.

**§ 4.** Skúlastjórin í tí skúla, har sjálvlesandi hevur verið til próvtøku, skrivar skjalváttan fyri próvtøkuúrslitið.

**§ 5.** Hetta rundskrivið kemur í gildi 14. februar 2012.

Mentamálaráðið, 14. februar 2012

Olaus Jespersen
*deildarstjóri*